ítróttur

Nr. 106 • leygardagur • 7. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Vit vænta okkum nakað

Finnbogi Ísakson

Antin eri eg so gamaldags ella eri eg so góður føroyingur, at eg skoyti ikki um ES-pass. Tá tey spyrja hjá fútanum, um eg vil hava reytt ella grønt pass, hyggi eg við stórum eygum og royni at gita, um hetta er skemt. Men tann fryntligva kvinnan innan fyri diskin meinar tað í álvara. Kennir seg kanska ikki heilt væl at spyrja meg um slíkt. Sigur: »Vit skula spyrja«.

Eg fekk tað grøna passið, og satt at siga havi eg ongantíð havt trupulleikar av tí. Hvørki í Moskva ella New York, Bangkok ella Rom. Ella nakra aðrastaðni.

Heldur ikki, tá eg fór til Kekkia í fjør. Har sum aðrastaðni hugdu teir eitt sindur meira at mínum passi enn øðrum, og eg kendi meg ikki sørt ernan. Vit ferðaðust við toki. Tá vit fóru um markið úr Týsklandi inn í Kekkia, skuldi passið vísast fram tvær ferðir. Fyrst skuldu týskarar síggja tað fyri at lova okkum úr landinum. Síðani skuldu kekkarar síggja tað fyri at lova okkum inn í landið.

Tá vit komu heimaftur var tað sjálvandi øvugt. Fyrst skuldu kekkarar síggja passið, og tað gekk skjótt. Teir tóktust ikki at hava nakað ímóti at sleppa av við okkum. Síðani skuldu týskarar síggja tað fyri at taka ímóti okkum.

Eftirlitsmaðurin hugdi leingi og væl at hesum undarliga passi, sum bendi á, at vit hoyrdu heima í fleiri londum, bæði í Føroyum og í Danmark. Hann orðaði okkurt við ein annan eftirlitsmann. Eg skundaði mær at siga: - Färöer Inseln! Og so skoytti eg uppí: - Fussball!

Tá stóð ikki á. - Ich weiss! Ich weiss! Segði týskarin og rætti mær smílandi passið. Føroyar og fótbólt, tað hevði hann hoyrt um. Hetta var eisini fáar vikur, áðrenn Føroyar spældu móti Týskalandi.

Spennandi løtur

Í hesum mánaðinum skal landsliðið spæla tveir spennandi dystir. Fyrst er tað dysturin móti íslendingum 7. juni. Íslendingar eru okkara nærmastu grannar, og kanska minna dystirnir millum føroyingar og íslendingar ikki sørt um dystirnar millum danskarar og svenskarar. Tað ræður um at vinna á grannanum - í allari viðskipiligheit. Enn hevur tað ikki eydnast okkum. Ein javnleikur er frægasta úrslitið higartil.

Danskarar plaga at taka til: - Á det område er svenskerne foran os. Vit noyðast vist í mongum førum at siga tað sama um íslendingar.

Og so er tað tann heilt stóri dysturin móti Týskalandi 11. juni á Tórsvølli. Tann heilt stóri? Ja, man tað ikki vera frægast at siga tað, áðrenn dysturin er spældur?

Eitt tað fyrsta, sum teir gomlu í politikki lærdu meg, tá eg kom á ting, var, at eg mátti ongantíð undirmeta mínar mótstøðumenn. Gjørdi eg tað, so skuldi eg rokna við at tapa.

Tað sama er galdandi í fótbólti. Kundi ikki rættiliga lata vera við at bølast oman á hesum tankanum, tá eg í Sjónvarpinum sá brot úr landskappingardystinum herfyri millum B36 og EB. Mær tókti, at B36-arnir høvdu ikki hugsað um dagin fyri, at teir skuldu spæla móti einum fyrstudeildarliði.

Slíkt kemur eisini fyri í altjóðaheimi, og tað hevur givið okkum føroyingum góðar og spennandi løtur. Sum nú til dømis, tá eysturríkarar á sinni hildu seg hava »ráð« til at fara til Keypmannahavnar at ballast kvøldið fyri, teir skuldu spæla móti føroyingum - hesum útróðarmonnunum og seyðamonnunum, sum nóg illa mundu vita, at bólturin er rundur. Úrslitið tók teimum dygt.

Helst var tað hetta sama, sum gjørdi seg galdandi, tá landsliðið spældi móti Týskalandi í heyst. Teir vistu jú nóg illa, hvar Føroyar lógu. Og ein tummi ella tveir longur til vinstru í skotinum hjá Hjalgrím Elttør kundi havt við sær, at teir gjørdust uppaftur nipnari enn eysturríkarar.

Løtur sum hesar eru ógloymandi. Men mær hevur kortini altíð tókt, at tann mest spennandi løtan var teir minuttirnar - ella vóru tað bara sekund? - tá Føroyar lógu á odda í dystinum móti Russlandi. Ivan hin Ræðuligi og Gotu-Tróndur. Tað átti ikki at borið til.

Professionelt

Hvussu tað man fara at gangast móti íslendingum og týskarum er ilt at siga. Men eitt er greitt: bæði millum leikarar, viðhaldsfólk, stuðlar og áskoðarar annars verður alt meira roknað við líkinda úrslitum, nú føroyskur fótbóltur er vorðin meira og meira professionellur.

Fyrr spældu vit bólt til stuttleikar. Bæði vit, sum funnu okkurt eitt slætt og opið pláss, ið kundi nýtast at spæla á, og teir, sum fóru upp í eitt lið. Um tað var dreingjaliðið ella fyrsta lið, sum spældi, so varð spælt til stuttleikar. Venjingarnar vóru eisini til stuttleikar. Frá fyrstu løtu vandu teir fótbólt.

Alt tað er søga. Nú fer stórur partur av venjingartíðini til eitthvørt heilt annað enn at spæla bólt. Nú skal kroppurin styrkjast, vøddarnir mýkjast, treystið mennast. Nú ræður ikki um at hava tað stuttligt. Tað ræður um at vinna. Nothing else.

Meira og meira peningur er eisini við í spælinum (um so er, at talan yvirhøvur er um spæl longur). Ikki bara peningur til útlendskar venjarar og annað slíkt. Nei, nú eru føroyskir fótbóltsleikarar eisini til sølu innanlands. Fyrr var tað ikki so óvanligt, at bygdadreingir spældu við havnarliðunum, tí teir gingu í skúla í Havn. Sjáldsamari var tað, at onkur ikki-innføddur spældi við KÍ ella TB.

Nú á døgum verða klaksvíkingar keyptir til Havnar og havnarmenn til Gøtu. Osfr. Tað mundi vera í fyrraárið, at Herfølge gjørdist Danmarkar-meistari. So vítt eg veit var ikki ein tann einasti spælari á liðnum føddur og vaksin upp í Herfølge. So galið er tað ikki blivið í Føroyum. Men man tað vera so langt burturi, at Nólsoy gerst Føroyameistari?

Øll henda professionalisman hevur við sær, at vit vænta okkum nakað av landsliðnum. Eisini tá tað skal spæla móti eini teirri mætastu fótbóltstjóðini í heiminum. Sjálvt um henda tjóðin man vera betur fyrireikað hesaferð enn seinast.

Hvussu hilnaðist? Tað kunna vit tosa um aftaná.

FM í svimjing:

Fleiri spennandi ungir svimjarar

Svimjifelagið í Gøtu, Skeggjar, er eitt felag við fleiri ungum og sera evnaríkum svimjarum

SVIMJING

Páll Holm Johannesen

Seinasta vikuskiftið varð skipað fyri FM í svimjing í svimjihøllini í Havn. Kappingin varð fríggjamorgunin sett av landsstýrismanninum, Høgna Hoydal, og hildið var á til sunnukvøldið. Tað vóru í alt um 100 svimjarar við í kappingini.

Nakað av spenninginum við FM-kappingini var farin, tí úttøkan til oyggjaleikirnar var gjørd undan

Grand prix vinnararnir: Erling Jacobsen, Karina Petersen og Elspa Mørkøre, øll úr Skeggjum

Mynd: Øssur Mohr

kappingini. Svimjararnir kýttu seg kortini fyri at fáa so góð úrslit sum gjørligt.

Tey ungu væl við

Teir yngru svimjararnir stóðu seg væl í FM kappingini, og vístu, at føroysk svimjing hevur eina bjarta framtíð. Bert 14 ára gamli Jákup Ø. Mohr úr Fuglafirði vann kappingina fyri 1500 frí, og ungi fuglfirðingurin er yngsti føroyameistarin hjá monnum síðan 1995.

Elida Bjarnadóttir úr HS og Sára Ejdesgaard úr TS eru tvær av evnaríkastu ryggsvimjarunum í Føroyum í løtuni, og tær vístu tær eisini í FM-kappingini. Elida vann kappingina fyri 50 metur rygg, meðan Sára vann kappingarnar í 100- og 200 metur rygg.

Ungi toftamaðurin, Per S. Hansen, er ein annar evnaríkur svimjari. Hann gjørdi eisini vart við seg við at vinna kappingina í 50 metur bringu. Tað heldur sjáldsama við Per er, at hann bert svimur bringusvimjing, men har skal leggjast afturat, at tað ger hann frágera væl.

Gongur væl í Gøtu

Svimjifelagið í Gøtu, Skeggjar, hevur fleiri sera evnaríkar svimjarar, sum avgjørt hava evnini til at gera seg galdandi í toppinum av føroyskari svimjing um nokur fá ár.

Erling Jacobsen, Elspa Mørkøre og Kári á Høvdanum fingu øll góð úrslit seinasta vikuskiftið. Kári og Erling settu nýggj bólkamet í bólki 3, meðan Elspa Mørkøre gjørdist grand prix vinnari í bólki 1,2 og 3. Leggjast skal afturat at Erling Jacobsen eisini gjørdist grand prix vinnari í bólki 1,2 og 3.

Íslendingar um dystin

ÍSLAND-FØROYAR

Páll Holm Johannesen

Sambandið millum Ísland og Føroyar hevur altíð verið tætt. Nógvir føroyingar búgva í Íslandi, og somleiðis íslendingar í Føroyum. Íslendingar eru í dag stórur partur av føroyska vinnulívinum, og hetta sæst eisini aftur á talinum av íslendingum, ið eru búsettir í Føroyum.

Vit hava hitt tríggjar teirra á máli, nú londini bresta saman í EM-undankappingardysti í dag.

Stjórin á Eimskip, Linda Bjørk Gunnlaugsdóttir:

-Eg haldi við báðum liðum

Stjórin á Eimskip, Linda B. Gunnlaugsdóttir, veit ikki hvørjum liði, hon skal halda við í dag. –Eg havi sterkar kenslur fyri báðum tjóðum, og tí má mítt boð vera, at eg haldi við báðum liðum, sigur Linda

Mynd: Savnsmynd

Linda B. Gunnlaugsdóttir býr í Føroyum á tríðja ári, og hon hevur sterkar kenslur fyri føroyingum

ÍSLAND-FØROYAR

Páll Holm Johannesen

Stjórin á Eimskip, Linda B. Gunnlaugsdóttir, býr í Føroyum á tríðja ári. Síðan 2000 hava hon og maðurin verið í Føroyum. Stjórin á Eimskip fylgir við í fótbólti bæði í Íslandi og Føroyum, og hon sigur seg vera sera spentan til dystin.

Linda B. Gunnlaugsdóttir er rættiliga í iva um hvørjum liði, hon fer at halda í dag. Hon er í løtuni í Íslandi í arbeiðsørindum, og fer til til landsdystin.

– Eg veit satt at siga ikki hvørjum eg haldi við í dag, tí eg havi sterkar kenslur fyri báðum tjóðum, so mítt boð má vera, at eg haldi við báðum liðum. Eg vóni, vit fáa ein stuttligan og spennandi dyst, sigur sigur Linda B. Gunnlaugsdóttir úr Reykjavík.

Linda ætlar sær at vera saman við føroyingum bæði undan og eftir dystin, tí sum hon sjálv tekur til, so hendir nakað, har føroyingar eru savnaðir.

Hondbóltsleikarin, Jakob Jónsson:

-Eg haldi við Føroyum



Hondbóltsleikarin Jakob Jónsson er ikki í iva, hvørjum liði, hann fer at heppa á í dag. Hann tippar, at dysturin endar 2-1 til Føroyar.

Mynd: Savnsmynd

Kyndilsleikarin sigur skemtandi, at íslendingar ofta kunnu tykast hástórir, og tí kundi verið stuttligt, um føroyska landsliðið kundi sett teir upp á pláss

ÍSLAND-FØROYAR

Páll Holm Johannesen

Ein av stinnastu hondbóltsleikarunum í føroysku kappingini farnu vetrarnar hevur verið íslendingurin Jakob Jónsson. Jakob kom til Føroya í 1998, tá hann gjørdist leikandi venjari hjá havnarfelagnum Kyndil.

Hondbóltssnillingurin hevur verið í Føroyum í góð fimm ár, og líkt er til hann er komin fyri at vera. Jakob Jónsson hevur funnið sær føroyska damu, og saman hava tey eina dóttur. Tá vit spyrja hann, hvørjum liði, hann ætlar at heppa á leygardagin, svara Jakob avgjørdur, at tað verður føroyska landsliðið.

– Eg stórtrívist í Føroyum, og eg vóni, teir megna at vinna á Íslandi. Skal eg gita úrslitið av dystinum, so sigi eg 2-1 til Føroyar. Íslendingar hava ofta lyndi til at vera nakað hástórir, og tí kundi verið stuttligt, um føroyska landsliðið setti teir uppá pláss, sigur Jakob Jónsson skemtandi.

Jakob leggur afturat, at ein føroyskur sigur í dag, hevði verið ein frálík uphiting til stóra dystin ímóti Týsklandi á Tórsvølli mikudagin.

Okkara kokkur, Guðmundur Guðmundsson:

-Eg verði íslendingur saman við føroyingum í Reykjavík

Okkara kokkur, Guðmundur Guðmundsson, verður í Reykjavík til dystin í dag. Hann fer at sita saman við føroyingum, men fer kortini at heppa á Ísland, sum hann væntar vinnur 3-1.

Mynd: Savnsmynd

Guðmundur vónar, at venjaraskiftið hjá íslendingum fer at betra um avrikini hjá íslendska landsliðnum. Hóast hann hevur búð í Føroyum í alt átta ár, so bankar hansara fótbóltshjarta framvegis fyri Íslandi

ÍSLAND-FØROYAR

Páll Holm Johannesen

Annar av vertunum í vælumtóktu sjónvarpssendingini, Okkara kokkar, Guðmundur Guðmundsson, hevur í alt búð átta ár í Føroyum. Kortini hevur hann torført við at sleppa Íslandi, og tað verður tí Ísland, hann fer at stuðla í dag.

– Hóast eg helst fari at búgva í Føroyum restina av mínum lívi, so er mítt fótbóltshjarta við Íslandi leygardagin. Eg havi keypt atgongumerki saman við føroyingum, og fari tí at sita millum føroysku áskoðararnar við Laugardalsvøllin, og heldur løgi heppa á Ísland, sigur Guðmundur Guðmundsson.

Guðmundur fylgir væl við fótbóltinum bæði í Føroyum og Íslandi, og hann er sera spentur undan dystinum. - Ísland hevur leikt illa seinasta árið, men nú er venjarin skiftur út, og eg vóni tí, at úrslitini fara at gerast betri, tí íslendska liðið er gott, greiðir kokkurin frá.

Guðmundur hevur sjálvur spælt fótbólt bæði í Íslandi og Føroyum. Í sínum ungdómsárum var hann somikið stinnur, at hann var annar av málmonnunum á íslendska U-16 landsliðnum. Fótbólturin mátti víkja fyri kokkaútbúgvingini, men áhugin fyri ítróttini er ikki minkaður við árunum. Tá vit at enda spurdu Guðmund um úrslitið av dystinum, svarar hann, at dysturin endar 3-1 til Ísland, og at føroyski málskjúttin verður Jákup á Borg.

Benthe og Andrass ársins svimjarar

Ársins svimjari hjá monnum, Andrass Thomsen, er ikki langt frá at røkka kravtíðini til EM-kappingina í 200 frí seinni í ár. Hann ætlar sær at royna at røkka kravtíðini á oyggjaleikunum seinni í mánaðinum

SVIMJING

Páll Holm Johannesen

Benthe Sikivat Andersen úr TS og Andrass Thomsen vórðu eftir FM kappingina seinasta vikuskiftið kosnir ársins svimjarar.

Mynd: Øssur Mohr

Í samband við FM kappingina seinasta vikuskiftið vórðu ársins svimjarar hjá kvinnum og monnum kosnir. Tað eru venjararnir í felagunum, ið luttaka í FM-kappingini, sum kjósa ársins svimjarar. Hjá kvinnum varð Benthe Sikivat Andersen úr TS vald. Grundgevingin var, at Benthe hevur havt góð úrslit í farna svimjiári, er fyrimyndarlig, dámlig og vinarlig.

Hjá monnum var Andrass Thomsen valdur til ársins svimjara. Grundgevingin fyri kjósingini var, at Andrass hevur havt góð úrslit í farna svimjiári, møtur væl til venjing og er ein fyrimynd hjá yngru svimjarunum.

Ársins svimjarar í ár stóðu seg eisini væl í FM kappingini. Benthe Sikivat Andersen vann ikki færri enn sjey kappingar, so lítið er at ivast í, at heiðurin sum ársins svimjari sanniliga er uppiborin. Andrass Thomsen vann tvær kappingar, men var so óheppin at verða kolldømdur í kappingini í 1500 m frí. Andrass setti nýtt føroyskt met í 200 metur bringu við tíðini 1.57,21.

Tíðin er so mikið góð, at Andrass er ikki langt frá kravtíðini til EM seinni í ár. Í sjónvarpinum mánakvøldið segði Andrass Thomsen, at málið er at røkka kravtíðini á oyggjaleikum seinast í mánaðinum. Spennandi verður at fylgja Andrassi, um hann megnar at røkka kravtíðini.